# Pietá

## Eftir Astrid Saalbach

**Tann 25. juli fer Birita Mohr og eitt mannfólk á pall á Tjóðpalli Føroya í Tórsgøtu 9 við sjónleikinum Pietá**

Birita Mohr spælir leiklutin sum Ria, ein tilkomin kvinna, sum vaknar tíðliga ein morgun í eini dubultsong á einum hotellkamari. Hon hevur dundrandi timburmenn.

Ein fremmandur yngri maður liggur við hennar lið.

Hvør er hann? Hvussu er hann komin upp í hennara song?

Ria hevur í langa tíð liva lívið við fullari ferð. Arbeiðslív og privatlív eru við at sindrast

– lygnir, sjálvsbedrag, smáar skandalir mynda í dag gerandisdagin hjá Riu.

Hví ikki bara flýggja undan heilt? Hví ikki bara bílleggja sær eina vínfløsku frá morgunstundini?

Og ímynda sær lívið sum tað kundi verið? Kanska saman við hesum fremmanda manni?

Leikurin Pietá er stuðlaður av sokallaða »Triðja beininum« undir Mentamálaráðnum, sum gevur yrkisleikfólki møguleikan at fremja egnar sjónleikaverkætlanir. Hesa ferð hevur Birita Mohr sjálv tikið stig til at seta hesa verkætlan í verk undir bólkinum Grímu.

*Unna tær eina góða frítøtu*
*í góðum selskapi*
*við einum góðum sjónleiki*
*spældur av góðum leikara*

»... mítt lív er ein dungi av ruski og lorti, sum eg flúgvi uppi yvir. Vínið er mínar veingir«.

Frumframførsla 25. juli. (fyri innbodnum)
Sunnudag 26. juli kl. 20
Ólavsøkuaftan 28. juli kl. 20
Ólavsøkudag 29. juli kl. 20
Hóskvøld 30. juli kl. 20
Fríggjakvøld 31. juli kl. 20
Leygarkvøld 1. august. Kl. 20
Framhaldandi sýningar verða lýstar seinni.

Leikstjóri: Egi Dam
Leikarar: Birita Mohr + eitt mannfólk!
Pallmynd, plakat, búnar: Marinna Mørkøre
Ljós, palsmíð: Árni Baldvinsson
Framleiðsla: Gunnvá Zachariasen
Hjálparfólk: Gunvør Hofgaard og Elisabeth Olsen

Atgongumerki á 160 kr. á forsølu á www.billett.fo.
180 kr. við dyrnar undan sýning.

**Birita Mohr hevur spælt óteljandi kvinnulagnir, eitt nú Antigone, Húsið hjá Bernarda Alba, Glataðu Spælimenninar, Móðir Sjeystjørna, Gøtan, Ginusøgur, Krypilin frá Innishman, Eitur nakað land Weekend?og Køksdrotningarnar.**
**Birita hevur eisini áður staðið einsamøll á palli í krevjandi kvinnuleikluti – á 1994 tá hon sum Rósa leikti einkonuleikin Skøkjurnar ganga fremst inn í himmalin eftir spaniólan José Luis Martin Descalzo.**
**Fyrr í ár fekk Birita væl uppiborið Herðaklappið fyri leiklut sín sum russiska konan Olga í Nordost.**



*Pietá er eitt italskt orð, sum vísir á hugtøkini sorgarvísa, miskunn, guðsótta og bøn um náði.*
*Pietá er somuleiðis ein listarlig mynd av Mariu Moy við krossfesta Jesus í føvninginum. Ein tann kendasta Pietá myndin er marmorstandmynd eftir Michelangelo í Pæturskirkjuni í Rom.*



saman við orðinum um kærleika og fyrigeving, sigur Egi fortørnaður. Og hann forklárar, at leiklistin hevur altíð verið vandamikil hjá valdsharrunum, og hin fyrsta listin, sum verður bannað ella kontrolerað, tá nýggj einaræði koma til.

### Fylgja dreymunum

Sum sjónleikarar hevur lívsrútman hjá Ega og Biritu verið øðrvísi enn hjá teimum flestu. Bæði gerandisdagurin og árini saman. Nógv at gera til tíðir og als onki aðrar tíðir. Við tveimum synum, sum nú eru vaksnir, hevur veruleikin viðhvørt bankað á dyrnar, og tey hava tikið sær leys størv fyri at fáa eina støðuga inntøku í eitt tíðarskeið. Líka frá lossing til posthús, vasking og í bóndagarði.

- Tá vit venja, eru vit 100 prosent á alla somlu tíðina í fleiri mánaðir. Meðan framførslurnar eru, arbeiða vit seinnapart og kvøld. Men tá ongin leikur er á plakatini, hava vit meira frítíð enn tey flestu. So tað hevur verið bæði strævið og óstabilt, men eisini deiliga fjølbroytt, sigur Birita. Og tey eru samd um, at tey vildu ikki verið lívið sum sjónleikarar fyriuttan.

- Vit fara í øllum førum ikki at sita og iðra okkum, tá vit verða gomul. Tí vit gjørdu tað, sum vit allarhelst vildu, sigur Birita, sum eisini er sera fegin um, at fólk taka so væl ímóti tiltøkunum, sum Gríma og Tjóðpallurin hava at bjóða.

### Fúla-Gríma

Samrøðan er at enda komin, og vit runda av við at spyrja, um tey veruliga dyrkaðu bólkasex í Fúlu-Grímu, sum Dagblaðið skírdi tey.

- Nei, tað gjørdu vit absolutt ikki! Men tað sigur nokkso nógv um, hvørjar óforloystar kreftir streingja seg á í høvdunum á fólki, tá tey leggja onnur undir slíkt, eru tey samd um.

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Kunning um ólavsøkuna




Bilferðsla ikki loyvd

Ongin gjøgnumkoyring – bussar/hýruvognar undantiknir

Meðan róð verður um kapp er stongt

## Ferðsla og P á ólavsøku

**Rennikapping** mánadagin 27. juli kl. 17.30-19.30; økið undir Bakka verður stongt fyri allari ferðslu.

**Kappróðurin** ólavsøkuaftan (millum kl. 14.00 og 19.00); Eystara Bryggja verður stongd fyri vanligari bilferðslu frá Kongabrúnni til Jónas Broncks gøtu. Somuleiðis er ikki loyvt at parkera á parkeringsøkinum á Bursatanga frá 27. juli kl. 20.00 til ólavsøkudag kl. 9.00.

**Ólavsøkuaftan, frá kl. 12.00 til hósdagin 30. juli kl. 12.00 eru hesar broytingar í ferðsluni:**
Bilferðsla er ikki loyvd eftir Áarvegnum frá Havnargøtu, niðan á Vaglið, í Mylnugøtu, í Niels Finsens gøtu frá Vaglinum og niðan til Sjónleikarahúsið, í Tórsgøtu, oman í Vágsbotn og yvir á Skálatrøð. Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er ikki loyvd tvørtur um Niels Finsens gøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún, undantiknir eru hýruvognar, Bussleiðin og Bygdaleiðir.

Meira um parkeringsviðurskifti sæst á **www.torshavn.fo**

**Bussleiðin**
Týsdagin 28. juli (ólavsøkuaftan) koyrir Leið 1 seinasta túr av Hamrinum kl. 13.53, Leið 2 koyrir seinasta túr av Argjum kl. 14.05, og Leið 3 koyrir seinasta túr av Norðasta Horni kl. 14.05.

Mikudagin 29. juli (ólavsøkudag) koyrir Leið 1 fyrsta túr kl. 11.53, og Leið 2 og 3 koyra fyrsta túr kl. 12.05.

## á ólavsøku

Móttøkuhúsið hjá Tórshavnar kommunu í Tróndargøtu er opið ólavsøkudag millum kl. 16.00 og 18.00, har høvi verður at síggja listasavnið í húsinum og húsið annars. Eisini Ráðhúsið og Býráðssalurin eru opin ólavsøkudag kl. 16.00 til 18.00.

## WC á ólavsøku

Á ólavsøku hevur Tórshavnar kommuna wc-vognar standandi ymsa staðni í býnum.

**Vognarnir standa á hesum støðum:**
Á P-økinum við J. Patursonar gøtu, á Skálatrøð og undir Bryggjubakka.

Harumframt verða kommunalu wc-ini opin í Kiosk Steinatúni, í Mylnugøtu og aftan fyri Sjónleikarhúsið.

## undir midnáttarsanginum

Midnáttarsangurin á Vaglinum ólavsøkukvøld er millum størstu tiltøk í Føroyum.

Samaritarnir hjá Reyða Krossi eru eisini á Vaglinum. Reyði Krossur hevur tríggjar støðir, soleiðis at tað altíð ber til at veita skjóta hjálp.

Telefon **112** ella **351448**.

Ansið væl eftir tykkum og tykkara næstrafólki.

**Sanghefti til midnáttarsangin**
Sanghefti til midnáttarsangin fáast í Snarskivuni frá mánadegnum 20. juli. Sangheftini fáast eisini í Ráðhúsinum og í Býráðssalinum, meðan opið er ólavsøkudag millum kl. 16.00 og 18.00. Somuleiðis fáast sanghefti í sambandi við sangløtuna á midnátt ólavsøkukvøld. Tá fara skótar at býta út á trappuni uttan fyri Býráðssalin.

## Góða ólavsøku!

Tórshavnar kommuna